Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Smærugøta 9A,
FR-100 Tórshavn.Tlf.316973. Fax 318516. fsn@fsn.fo www.fsn.fo

Tórshavn tann 2023 03 14

Hoyringsskriv

Uppskot til
Løgtingslóg
um
broyting í løgtingslóg um veiðigjøld fyri fiskiskap (Veiðigjaldslógin)
(dagføring av gjøldum, veiðigjald fyri lodnu og heystgýtandi sild og strikan av undantaki fyri heimaflotan)

Føroya Skipara - & Navigatørfelag ” FSN ” vil hervið koma við viðmerkingum til ætlaða uppskot um broytingar í Løgtingslóg um veiðuavgjøld fyri fiskiskap (Veiðigjaldslógin)

FSN tekur sum heild undir við tilfeingisgjøldum, og uppskotinum um veiðiavgjøld fyri botnfisk í Barentshavinum, og fyri pelagiskan fisk so sum Makrel, Sild, svartkjaft og Lodnu, tó ikki fyri heimaflotan.
Tó halda vit, at ætlaðu gjøldini eru sera høgt sett.

Tá talan er um ymisku ásetingarnar, sum verða ásettar alt eftir hvat prísurin hevur verði árið fyri, kann verða óheppi, um prísurin fyri seinna árið er met lágur.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum
2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

FSN vil vísa á, at hetta uppskot hevur rættuligani stórar avleiðingar fyri skiparar og manning, sum starvast í hesi vinnu, tí sum nú er, so eru øll allmenn ásett veiðuavgjøld ein loyvdur frádráttur hjá reiðaranum, t.v.s. at manningarnar rinda sín stóra part av veiðugjaldinum, men manningarnar eiga einki í kvotuni / kvotunum.

Verður støðið tikið í verandi gjøldum á uppsjóvarfiski sæst munurin á verandi og nýggja gjaldinum í talvuni niðanfyri.

	Miðalprísur- 21/22 (kr./kg.)	veiðigjald (kr./kg.)	nýtt veiðigjald (kr./kg.)
makrelur	6,63	1,23	1,46
norðhavssild	4,96	0,89	0,89
heystgýtandi sild	4,96	0,00	0,89
svartkjaftur	2,05	0,31	0,31
lodna	5,17	0,00	0,98
botnfiskur	21,60	1,08	2,16

Um undantøkini fyri heimaflotan verða strikaði so vænta vit at trupuleikin gerst nógv størri enn hann er í dag við at manna heimaflotan, fiskiskaprin hevur ikki verði naka at reypa av, um so prísirnir hava verði nøkulunda til tíðir.

§ 17. Frádráttir

Nýtt stk. 3.

a) Alment ásett veiðugjøld eru loyvdir frádráttir.

b) Tá rættindi eru keypt, eru loyvdir frádráttir:

1. Av upphædd, samsvarandi alment ásettum veiðigjaldi, 100%, og
2. Av upphædd sum er tvær ferðir (1), frádrigið (1) 50%, og
3. Av upphædd sum er tríggjar ferðir (1), frádrigið (1) og (2) 50%

c) Tá talan er um keypt fiskirættindi, har ikki er ásett alment veiðigjald, verður nýttur sami frymil, tó soleiðis, at ístaðin fyri alment ásett veiðigjald, verður í (1) brúkt 100 oyru.

d) Fyri rættindi, sum keypt eru áðrenn 1. apríl 2019, og verða fiskaði aftaná hendan dag, er galdandi sami frymil sum frammanfyri, við tí broyting, at loyvdur frádráttur:

1. Av upphædd sum er omanfyri (1) frádrigið (1) 75%

e) Keyp av føroyskum kvotum og/ella fiskidøgum millum føroysk skip er ikki loyvdur frádráttur.

Upprunaliga er hetta ein gomul áseting frá 80 inum tá skip fiskaðu rækjur í Canada, og manglaðu nøkur tons í last, tá bleiv ein semja gjørd um, at keypa írestandi kvotur í felag.
Men ásannandi so hevur hendan áseting fylgt/forfylgt manningunum til dagin í dag.
Tað var nokk ongantíð sæð, at ein uppboðssøla fór at koma í hesari øldini, og eru viðurskiftini broytt munandi síðan í 80 inum.

FSN er á tí áskoðan, at tann sum skal valda, ja hann má gjalda

FSN vil mæla til, at avgjøldini liggja longur inni í systeminum / rokniskapinum, og ikki sum nú er í 1. lið

FSN vil vísa á dómin í Eystara Landsrætti sum bleiv Afsagt tann 13. september 2022, og har Fiskimálaráðið fekk 100% viðhald í, at Fiskimálaráðið hevði loyvi til at lóggeva við:

Og her hugsað vit serliga um § 7. stk. 2

FSN vit heita á okkar høga Ting og Landsstýrið, um at íverkseta hesa lóg beinanvegin aftur, við smávegis broytingum.

Nr. 30 12. apríl 2016

Løgtingslóg um serstakar treytir fyri fiskiskapi eftir makreli, norðhavssild og svartkjafti og botnfiski í Barentshavinum í 2016

Manningarviðurskifti

§ 7. Manningar á fiskiførum undir føroyskum flaggi, sum fiska makrel, norðhavssild, svartkjaft ella botnfisk í Barentshavinum, og manningar á móttøkuskipum undir føroyskum flaggi, sum taka ímóti somu fiskasløgum, skulu í 2016 lønast samsvarandi sáttmálum við føroysk manningarfeløg.

Stk. 2. Gjaldið fyri kvotur, keyptar á uppboðssølu, kann ikki dragast frá søluvirðinum av veiðuni, tá hýrur verða gjørdar upp og goldnar manningini.

Hetta kundi verði soljóðandi: Øll almen ásett veiðu avgjøld og *gjaldið fyri kvotur keyptar á uppboðssølu, kunnu ikki dragast frá søluvirðinum av veiðuni, tá hýrur verða gjørdar upp og goldnar manningini.*

FSN er á tí áskoðan, tá reiðarin eigur kvoturnar, so má reiðarin rinda tað í tað kostar at fáa kvoturnar.

Manningarnar hava onga ávirkan á sølu av fiskaða fiskinum, tí har vil reiðarin yvirhøvur hava fiskin á sítt egna virkið, og viðgerðan har sum hann vil, fiskurin verður ongantíð bjóaður út til hægst bjóandi.

Ein annar skeivleiki í hesum er, um reiðarin selur alt tilfeingið til 3. persón/felag, so fáa manningarnar einki burtur úr søluni, men í besta førði eina uppsøgn.

So her má verða talan um ein reiðara sum vil valda, og harvið má sami / somu reiðarar gjalda.

Til síðst, so vil FSN heita á okkara høga ting / Landsstýri um at íverkseta somu lóg aftur, ella fáa gjaldið frá loyvishavaranum longur inn í rokniskapinum og ikki í 1. lið.
”sum er manningin”

Vinarligast
Annfinnur Garðalíð
Formaður